## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Sunnan og landsynningur, 8 til 13 m/s, mest skýggjað, men turt. Um náttin minkar hann vindin av vestri, 3 til 8 m/s, skýggjað og regn av og á. Hitin millum 6 og 10 stig.




**Veðrið morgin**
Vestan og norðan, 3 til 8 m/s, skýggjað og regn av og á. Um náttina turt og hann klárar í. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin**
Útnyrðingur, seinni vestan, 3 til 8 m/s, skiftandi skýloft og turrveður. Hitin um 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin**
Vestan, 3 til 8 m/s, skiftandi skýloft og turrveður. Hitin um 5 stig. Um náttina, útsynningur, 8 til 13 m/s, mest skýggjað, men framvegis turt. Hitin millum 5 og 8 stig.

Miðvikan í morgin:

# Vanlukkan sum var so ræðulig at eingin vildi tosa um hana

**Í Miðvikuni í Sosialinum í morgin frætta vit um vanlukkuna við Acorn í 1928, tá sjey menn doyðu av eldsbruna umborð – fýra teirra vóru gjáarmenn**

SIÐSØGA
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*

Sum nógvar aðrar bygdir hevur Gjógv mist nógv fólk av vanlukkum, serliga á sjónum. Minnisvarðin við Gjógv við sínum 57 nøvnum sigur frá mongum syrgiligum søgum. Størsta vanlukkan hendi í 1870, tá ið tveir bátar við 16 monnum gingu burtur. Í 1884 fór aftur ein bátur við 8 monnum. Í 1901 fór ein bátur við trimum monnum. Í 1920 gekk Kristina burtur, og við henni fórust 6 gjáarmenn.

Í Miðvikuni í morgin er frásøgn um vanlukkuna við Acorn í 1928, tá sjey menn doyðu av eldsbruna umborð, av hesum vóru fýra gjáarmenn.

Frásøgnin er partvíst grundað á tað, sum longu er skrivað um sjálva vanlukkuna, sum var so ræðulig, at eingin vildi nakrantíð tosa um hana. Men nú hevur Dinnafía Ferjá við sínum framúr minni greitt okkum frá tí, hon minnist um vanlukkuna. Afturat hesum hava vit fingið tilfar, upplýsingar og myndir frá avvarðandi hjá teimum, sum doyðu, og hevur hetta gjørt tað møguligt at fáa lýst hesa vanlukku so fullfíggjað, sum tað kann gerast.

Hetta er ein sera kensluborin frásøgn. Sera hjartanemandi er heilsanin, sum tann 16 ára gamli Poli sendi mammu síni á deyðastrá. Tað sama er galdandi fyri frásøgnina frá hesum vanlukku degi, tá boðini koma til Gjáar.

Hjartaskerandi er eisini søgan um Jákup Paula Biskopstø, sum brendist so illa í andlitið, at hann gjørdist ókenniligur, tá hann royndi at bjarga soninum úr tí brennandi lugarinum, at hann lá á sjúkrahúsi í tvey ár.

Samstundis er henda søgan lívsjáttandi, tí hon vísir, hvussu tey, sum komu út fyri slíkum hendingum, høvdu eina slíka sálarstyrki, at tey reistu seg aftur og kundu liva lívið víðari.

Hetta er ein frásøgn, sum er ein partur av okkara fiskimannasøgu. Vit hava viljað tryggjað okkum, at hon ikki verður gloymd. Tann, sum lesur hesa søgu, fer heldur ikki at gloyma hana!




*Minnisvarðin í Reykjavík yvir teir sjey føroyingarnar, sum fórust í eldinum umborð á Acorn í 1928*

*Mynd: Óli Jacobsen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 11 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | -- |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 22 |
| New York | 9 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Veðurlagið**
Eitt hátrýst yvir Miðskandinavien hvørvur spakuliga eystureftir. Eitt lágtrýst fyri Ísland ferðast í ein landnyrðing, og eitt tilhoyrandi brúgvalag verður við Føroyar mikunáttina.




Hósdagin og fríggjadagin kemur eitt hátrýst suður um Føroyar á veg eystureftir, og fríggjadagin og leygardagin kemur lýggj og slavin luft yvir oyggjarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/3 kl. 06[00]– 25/3. 06[00]. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 13,0 mm – mált frá 19/3 kl. 06[00]– 20/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 182,0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 19. mars | Tendring/mánin næstur jørðini |
| 25. mars | Fyrra kvarter |
| 2. apríl | Fullmáni |
| 3. apríl | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. Mars | 03.07 | 15.33 | 02.07 | 14.33 | 02.22 | 14.48 | 05.07 | 17.33 | 06.07 | 18.33 | 01.22 | 13.48 | 00.22 | 12.48 | 03.22 | 15.48 | 04.22 | 16.48 | 02.52 | 15.18 | 04.07 | 16.33 |
| 28. Mars | 03.59 | 16.23 | 02.59 | 15.23 | 03.14 | 15.38 | 05.59 | 18.23 | 06.59 | 19.23 | 02.14 | 14.38 | 01.14 | 13.38 | 04.14 | 16.38 | 05.14 | 17.38 | 03.44 | 16.08 | 04.59 | 17.23 |
| 29. Mars | 04.47 | 17.08 | 03.47 | 16.08 | 04.02 | 16.23 | 06.47 | 19.08 | 07.47 | 20.08 | 03.02 | 15.23 | 02.02 | 14.23 | 05.02 | 17.23 | 06.02 | 18.23 | 04.32 | 16.53 | 05.47 | 18.08 |
| 30. Mars | 05.30 | 17.49 | 04.30 | 16.49 | 04.45 | 17.04 | 07.30 | 19.49 | 08.30 | 20.49 | 03.45 | 16.04 | 02.45 | 15.04 | 05.45 | 18.04 | 06.45 | 19.04 | 05.15 | 17.34 | 06.30 | 18.49 |
| 31. Mars | 06.09 | 18.28 | 05.09 | 17.28 | 05.24 | 17.43 | 08.09 | 20.28 | 09.09 | 21.28 | 04.24 | 16.43 | 03.24 | 15.43 | 06.24 | 18.43 | 07.24 | 19.43 | 05.54 | 18.13 | 07.09 | 19.28 |

